# Nýggjur og lættari Mazda2



Nýggi Mazda2, sum kemur á marknaðin í heyst, verður bæði teknaður og framleiddur hjá Mazda í Japan




Fyrsti Mazda2 fer av samlibandinum í Hiroshima

**Mazda2 verður í heyst avloystur av einum nýggjum bili við saman navnið. Talan verður um ein heilt nýggjan hatchback við fimm hurðum, sum verður teknaður og framleiddur hjá Mazda í Hiroshima**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í heyst kemur ein heilt nýggjur Mazda2 á marknaðin. Meðan núverandi Mazda2 er meira til tey tilkomnu, vendir hesin nýggi sær serliga til unga ættarliðið.

Nýggi Mazda2 hevur einki við forgangaran at gera – tað einasta teir hava til felags er navnið og støddin, sum er áleið tann sama. Ein nýggjur bilur frá topp til tá.

Núverandi Mazda2 verður gjørdur í Valencia í Spania saman við Ford Fiesta, meðan tann nýggi verður bæði teknaður og gjørdur hjá Mazda í Hiroshima í Japan. Japanararnir koma eisini at tekna tann næsta Ford Fiesta, sum verður bygdur yvir sama plattform sum Mazda2. Ford eiga umleið ein triðing í Mazda.

Við allari tí nýggju tøkni er tað vanligt, at bilarnir verða tyngri so hvørt sum nýggj modell koma á marknaðin. Men Mazda settu sær fyri við Mazda2 at gera ein lættari bil, og tað hevur eydnast teimum at gera ein bil, sum er millum 100 og 200 kg lættari enn kappingarneytarnir. Hetta fyri at gera bilin meira orkusparandi og lættan at umgangast í ferðsluni, uttan at tað á nakran hátt gongur út yvir trygdina.

Mazda2 kemur í fyrstu atløgu at fáast við tveimum 1,3 litra motorum við ávikavist 75 og 86 hk og einum 1,5-litra motori við 103 hk. Seinni kemur eisini ein 1,4 litra dieselútgáva.

Bilurin er gjørdur í sama væl umtókta "zoom-zoom" stíli, sum byrjaði við Mazda6 í 2002, síðan komu Mazda3 og Mazda5. Í heyst kemur so Mazda2 á evropeiska marknaðin.



Mazda2 er ein heilt nýggjur hatchback við fimm hurðum

# cee'd við tigandi dieselmotori

**Kia Ceed, ið er best kendur fyri síni sjey ára garanti, fæst eisini við einum 1,6 litra 115 hk dieselmotori, sum er sera friðarligur og kraftar væl**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kia tóku allan bilídnaðin á bóli fyrr í ár, tá teir komu á marknaðin við Kia Ceed við sjey ára garanti. Bilurin fær sera góð skotsmál frá evropeiskum motorjournalistum, sum ikki ivast í at Kia við hesum bilinum hava sera góð kort á hondum í hørðu kappingini um evropeisku kundarnar.

Ceed er gjørdur á eini av heimsins mest framkomnu bilverksmiðjum, ið koreanararnir hava latið bygt í Slovakia, og Kia Ceed er fyrsti bilur, sum kemur frá hesi verksmiðju.

Kia Ceed fæst við 1,6 litra dieselmotori við 115HK og snúningsmomenti upp á 255 Nm við 1.900 snúningar.

Umframt dieselútgávuna fáast Kia Ceed fáast við trimum ymiskum bensinmotorum: 1,4 litur við 109 hk, 1,6 litur við 122 hk, og 2,0 litur við 143 hk.

Bilurin kann síggjast og roynast hjá Berg Motors. Dieselútgávan byrjar við kr. 226.800.



*Kia Ceed fæst við 1,6 litra dieselmotori við 115HK , sum er sera friðarligur og kraftar væl*